gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Æðuvík er best røkta bygd í øllum Føroyum



*Hesir tríggir hava nakað at vera ernir av, tí teir koma úr trimum teimum best røktu bygdunum í Føroyum. Ytst høgrumegin stendur Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar Kommunu, sum eisini umfatar Æðuvík. Í miðjuni,Georg Hansen, skrivari í Miðvágs Kommunu og Ásbjørn Djurhuus, næstformaður í Haldórsvíkar Kommunu, sum umfatar Tjørnuvík. Fremst á myndini er kollasjan, sum Jens Frederiksen hevur gjørt við tilfari, sum hann hevur funnið í Sandágerði*

**Í Æðuvík er bygdarfólk og Kommunan fingið heiður og æru fyri at áralangt arbeiði at at rudda og fríðka bygdina**

RØKISSKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Æðuvík er ikki ein bygd, sum hevur verið samtaluevni hjá fólki. Hon er heldur ikki ein bygd, sum er at síggja í teimum litføgru faldarunum, sum hvørt ár verða sendir í øll heraðshorn í eini roynd at lokka útlendsk ferðafólk til Føroya.

Mikudagin var alt hetta broytt, tí nú er Æðuvík av álvara komin á Føroyakortið.

Tað hendi á samkomu í Norðurlandahúsinum seinnapartin mikudagin, har Æðuvík vann kappingina um at vera best røkta bygd í Føroyum.

Saman við heiðrinum, fekk Æðuvík eitt listaverk og 30.000 krónur. Listarverkið, er fyribils hongt í Missiónshúsið til endalig avgerð verður tikin um, hvar hann skal hanga, møguliga verður tað í Býráðshúsinum í Runavík, sum Æðuvík er í kommunu saman við. Tað er eitt listaverk, sum Jens Frederiksen hevur gjørt við tilfari, hann hevur funnið í Sandágerði.

Tað er heldur ikki avgjørt hvat tær 30.000 krónurnar skulu brúkast til. Men Æðuvík er ein sjáldsama ung bygd. Av teimum 97 fókunum í bygdini eru yvir 30 børn undir 14 ár og tað má sigast at vera rættiliga óvanligt á bygd í Føroyum. Og okkurt er á veg afturat.

Væntandi verður í hvussu so er ein partur av pengunum, brúktur upp á børnini, sigur Jóna Christiansen sum var ein av teimum mongu æðuvíkingunum í Norðurlandahúsinum mikudagin.

Tey, sum sita í dómsnevndini, sum hava valt best røktu bygdina, eru Óli Mikkelsen, lækni í Havn, sum er formaður, Gunnleyg Durhuus, arkitektur, sum er trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar Kommunu, Tórálvur Weihe, arkitektur, Jacob Pauli Joensen, umhvørvisverkfrøðingur á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Osva Olsen, fólkalívsfrøðingur á Føroya Fornminnissavni.

Annars er tað Ferðaráð Føroyar, sum samskipar tiltakið.

Umframt at Æðuvík er best røkta bygdin, valdi dómsnevndin eisini Miðvág til at vera næstbest røktu bygdina í Føroyum og Tjørnuvík varð nummar trý.

Orsøkin til, at Æðuvík vann kappingina var sjálvsagt tí, at har var ruddligast og nossligast. Men har høvdu tey eisini gjørt nakað fyri ferðafólkið, eitt nú er alment wc í bygdini og bygdargøtur eru merktar av. Somuleiðis eru klakkkir, rottangar og onnur viðurskifti, fingin í rættlag.

# Landskøsturin er nú eitt prýði fyri landið

**Tað eru ikki so nógv ár síðani, at Æðuvík var ruskpláss hjá stórum parti av landinum**

RØKISSKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað er ikki av tilvild, at Æðuvík vann sær pláss í Føroya Søgu sum best røkta bygd í 2001.

Men tað er ikki so nógv ár síðani, at Æðuvík var ruskpláss hjá eimum stórum parti av landinum. Allastaðni frá komu ruskbilar til Æðuvíkar at stoyta sína ótespuligu lastir útav bakkanum á Fossdalsbakka, har ruskplássið var.

Tá var mangan ónossligt í Æðuvík.

– Síðani er ómetaliga nógv hent, og eg haldi, at tað er væl klárað, at vit hava vunnið heiðurin at vera best røkta bygd í landinum í ár, heldur Jóna Christiansen.

Men tað er eisini lagt eitt stórt arbeiði í at fáa bygdina so vakra og nossliga.

– Vit vóru eisini við í kappingini seinast og tá vóru vit nummar tvey. Tað gjørdi, at áhugin fyri at halda fram var rættiliga stórur og alt bygdarfólkið var rættilgia spent upp á at royna at vinna fyrsta plássið her.

Øll bygdin tekur dugliga ikið lut í arbeiðnum at halda bygdina reina og ruddiliga og tað minsta øll hava gjørt, er at hampa og nossla rundanum hjá sær sjálvum. Samstundis hevur kommunan gjørt eitt stórt arbeiði at fáa ymisk viðurskifti í rættlag.

Jóna Christiansen sigur, at alt bygdarfólkið hevur í nógv ár gjørt rættiliga nógv burturúr at rudda bygdina, vegirnar og mølina.

– Tað besta er, at vit hava eisini fingið lagt tað niður í børnini, at tey skulu ikki órudda. Og tað hevur fest seg, tí tá ið børnini koma heim um kvøldarnar, hava tey karamellpappír og annað burturkast í lumman-um, heldur enn at tveita tað á vegin.

– Tá ið børn úr Æðuvík eru aðrastaðni og ferðast, fáa tey mangan tað skoðsmál heimaftur við, at tey ganga sera væl um. Tað hava fólk aðrastaðni lagt til merkis og tað eru vit fegin um.

Hon sigur, at yvirhøvur verður tað ikki væl dámt um fólk tveita frá sær og gera tey tað, verður tað átalað.

– Í Æðuvík er bannlýst at tveita frá sær

Men hetta hevur ikki skapt misstemning í bygdini. Tvørturímóti hevur tað skapt nógva sosiala samveru og gott samanhald í bygdini, at vit rudda og nossla í felag.

– Vit hava eisini havt nógvar stuttligar løtur burtur úr hesum. Úrslitið sæst eisini, tí nú er tað ógvuliga nossligt og rudduligt í Æðuvík.

Hon heldur, at nú Æðuvík hevur fingið hendan heiðurin, fer tað at eggja fólki til at halda á og kanska at gera enn meiri burturúr. Tað kundi kanska eisini eggjað fólki í øðrum bygdum í kommununi at tikið táttin upp, tí tað er ikki líka væl vorðið allastaðni.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Løgmaður fer ikki at samráðast týsdagin



**Tað liggur ikki fyri hjá løgmanni at samráðast við danska fíggjarmálaráðharran um blokkin komandi týsdag. Harafturat vil løgmaður, at Nyrup skal standa fyri samráðingunum**

HEILDARVEITINGIN
*John Johannessen*

Anfinn Kallsberg, løgmaður, tekur ikki av innbjóðingini frá danska fíggjarmálaráðharranum, Piu Gjellerup, um at koma á fund um blokkstuðulin komandi árið.

Tað liggur nevniliga ikki fyri hjá løgmanni at fara til Danmarkar á fund týdagin, tí hann hevur fyri langari tíð síðani lovað at verið við á einum øðrum fundi tá.

Harafturat vil løgmaður, at samráðingarnar um blokkstuðulin skulu vera við danska forsætisráðharran. Og løgmaður vil eisini hava ein yvirskipaðan fund um yvirtøkur við danska forsætisráðharran.

Landsstýrið fer í næstum at senda Poul Nyrup Rasmussen bræv um hesi viðurskifti. Men er ikki gjørt av, hvat skal standa í brævinum.

Løgmaður og danski forsætisráðharrin hava annars tosað saman í telefon seinastu dagarnar.

## MáF skipar fyri Barnasjónleikarastevna

Leygardagin 9. juni skipar MáF fyri Barnasjónleikarastevnu í Havn. Frá klokkan 10:00 - 13 fara 5 bólkar við tilsaman 80 børnum at spæla sjónleik í býnum. Ætlanin við stevnuni er, at børn, sum arbeiða við sjónleiki í skúlanum og í frítíðini, fáa høvi at framføra fyri øðrum og at síggja hvussu aðrir bólkar hava arbeitt. Eisini vóna vit at tey fara at stuttleika sær óført.

Tiltakið skuldi eftir ætlan vera 19. mai, men varð útsett vegna verkfall. Av tí sama, eru tað tíverri tveir bólkar, sum ikki kunnu vera við hesuferð. Bólkarnir hava gjørt nógv burturúr, men tað sum umræður er, at børnini fáa ein góðan dag. Um tiltakið verður væleydn að, kann tað væl hugsast at ein barnastevna verður við jøvnum millumbilum. Av tí at hetta er tann fyrsta av sínum slag, kann roknast við at okkurt skal broytast til næstu ferð.

Spælt verður í Sjónleikarhúsinum, við Viðarlundina (har, sum Pisufundurin vanliga er) og í Grasagarði. Bólkarnir, sum eru við: Sandoyar Meginskúli, Sjónleikaskúlin hjá Havnar Sjónleikarfelag, Kommunuskúlin, Norðskála /Oyra skúli og Sjónleikaskúlin í Nólsoy. Framførslurnar eru ókeypis og øll eru vælkomin (um tað er pláss).

Frá kl 11:00 - 13:00 kunnu øll børn, sum hava hug, verða sminkað í Sjónleikarhúsinum. Hetta kostar kr. 25,- fyri hvønn

SKRÁIN

kl 10:00 Í SJÓNLEIKARHÚSINUM
Kommunuskúlin framførir leikin "Djóra fagnaður"

kl 10:15 við VIÐARLUNDINA
Sandoyar Meginskúli framførir leikin "Børkan og Svínahvonnin"

kl 11:15 Í SJÓNLEIKARHÚSINUM
Sjónleikarskúlin hjá HS framførir leikin "Snjódrotningin"

kl 12:15 í GRASAGARÐI
Norðskála/Oyra skúli framførir leikin "Konan í Runugrøvini"

kl 13:15 Í SJÓNLEIKARHÚSINUM
Sjónleikarskúlin í Nólsoy framførir leikin "Maria"

# Stórhvalaveiða nervar sviar

**Sviar dáma ikki, at partur av Norðurlondum hugsar um stórhvalaveiðu við útflutningi fyri eygað. Hetta ger svenski umhvørismálaráðharrin greitt í svari til Jógvan við Keldu og Dan R. Petersen, sum umboða Føroyar í Norðurlandaráðnum**

NORÐURLANDARÁÐIÐ
*John Johannessen*





*Jógvan við Keldu og Dan R. Petersen, limir í Norðurlandaráðnum*

Tað nervar sviar, at lond í Norðurlandaráðnum hugsa um at fara undir stórhvalaveiðu við útflutningi fyri eygað.

Hetta er greitt, eftir at svenski umhvørvismálaráðharrin, Kjell Larsson, hevur svarað einum fyrispurningi Jógvani við Keldu og Dan R. Petersen.

Teir báðir føroysku limirnir í Norðurlandaráðnum hava spurt svenska umhvørvismálaráðharran, hvat tað eru fyri fyrivarni, Svøríki hevur tikið fyri brotinum um veiðu í frágreiðingini um burðardygga menning í Norðurlondum.

Jógan við Keldu og Dan R. Petersen gjørdu í fyrispurninginum vart við, at bæði føroyingar og íslendingar fleiri ferðir á ráðstevnuni um burðardygga menning í Oslo 2. og 3. apríl gjørdu vart við, at tað var óheppi, at Svørkíki tekur fyrivarni fyri brotinum um veiðu. Men hóast hetta, kom einki svar frá svium um, hvørki fyrivarnini vóru.

Men nú er greitt, at sviar eru bangnir fyri, at føroyingar og íslendingar fara at veiða stórhval og selja hann. Hetta helst tí, at sviar meta, at hetta kann skaða umdømið hjá Norðurlondum í heimshøpi.

Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin